Skúlastýrisfundur saman við Skúlanum við Løgmannabreyt 1. mars kl. 16:00

1. **Forskúli í Hoyvík:**
   Børn, sum byrja í forskúla, skulu í 1. flokk í sama skúla. Politiskt hevur Tórshavnar kommuna sagt, at øll øki í Føroyum skulu hava forskúla, og Tórshavnar kommuna hevur sagt, at tey børn, sum ganga í forskúla hava fyrsta rætt at sleppa í 1. flokk.
   Tað er óheppið, at kapping kemur millum skúlarnar, um mann hevur forskúla ella ikki.
   Kommunan er í tvídrátti, tí barnagarðarnar eru útbygdir til skúlabørn samstundis sum skúlarnir hava forskúla.
   Trupulleikin í Hoyvíkini er, at hølisviðurskifti eru ikki til forskúla í hvørgum av skúlunum, g so leingi sum vit ikki hava hølisviðurskifti, so er spurningurin um forskúla ikki so relevantur.
   Niðurstøðan er, tað verður ikki skipaður forskúli í Hoyvíkini, fyrrenn hølisviðurskiftini eru nøktandi.

2. **Samstarv um vallærugrein:**
   Sum útgangsdtøði hevði tað verið gott við einum samstarvi. Tað var samstarv fyrr, men hví tað datt niðurfyri hevur kanska nakað við tímabýti at gera. Mest upplagt er at samstarva um tey klassisku fakini, men akkurát hvussu hetta verður gjørt, er sum so eingin loysn uppá. Um skúlastýrini ynskja meiri samstarv um vællærufakini, er tað so ein møguleiki? Ja; Tað er ein møguleiki.
   Hvussu vera hesar lærugreinirnar presenteraðar fyri at fáa tey ungu at velja tey kreativu fakini, tí hesir vælfaksfundirnir leggja ofta so stóran dent á tey fakfakligu fakini.
   Niðurstøðan er, at tað kann samstarvast.

3. **Ferðsluviðurskiftini í Hoyvík:**
   Skúlastýrið í Hoyvíkar skúla hevur fleiri ferðir gjørt vart við sína ónøgd um ferðsluviðurskiftini rundan um skúlan uttan úrslit.
   SVL hevur fingið nógv í verk av ti, sum tey hava ynskt.
   Skeltingin við Karlamagnusarbreyt loyvir ikki børnum at súkkla, um mann skal síggja strangt tikið upp á skeltingina. Sjálvur ferðslutrupulleikin er størri út ímóti Løgmannabreyt enn Karlamagnusarbreyt (SVL). Spurningurin er, um mann skal hugsa um bilistar fyrst og fremst ella súkklistar, fótgangarar osv.
   Mann burdi gjørt eitt generelt skriv umboðandi báðar skúlarnar um ferðslutrupulleikarnar, av og á skipan osv. Niðurstøðan er, at bæði skúlastýrini gera eitt felagsskriv saman við leiðslunum og evt. eigarafeløgunum til Tórshavnar kommunu um ferðsluviðurskiftini rundan um báðar skúlarnar.

4. **Samstarv millum skúlarnar:**
   Hvussu ofta skal ein sovorðin felagsfundur vera? Eina ferð um árið kanska?
   Skulu vit til dømis hava felagsforeldratiltak fyri at fáa fleiri foreldur at møta upp?

   Ymiskt/annað: Einki er á skrá

   Fundurin er lokin kl. 17:20